


*Nr. 1* *7. januar 2018* *78. árg.*

# Gud svíkur ikki

„Bíbliuna dugi eg ikki uttanat," segði ein jútlendingur, „men 5. ørindið í 13. kapitli í Hebrearabrævinum gloymi eg aldri. Hetta var fyrsta bíbliuversið, sum mamman hevði lært hann, og tað var í samband við, at hann skuldi læra at súkkla. Eldra systir hansara hevði sagt, at hon skuldi læra hann.

Men tá í tíðini var ikki sum nú, at hvør einstakur í húsinum átti súkklu í hóskandi støðd. Nei, heima hjá teimum var bara ein súkkla, og mamman átti og brúkti hana. So tað var á hennara súkklu, hann skuldi læra at súkkla.

Tá ið tú bara ert seks–sjey ára gamal og skalt súkkla á eini súkklu, har hendurnar á róðrinum eru ájavnt við oyruni, og tú følir saðilin millum herðabløðini, kann tað vera eitt sindur trupult. Men systirin segði, at hon skuldi halda væl í súkkluna, og at hon ikki skuldi sleppa. So hann kleiv hugagóður upp á hetta stóra dýrið. Og tað gekk óføra væl. Tey súkklaðu fleiri ferðir aftur og fram eftir vegnum, líka til hann brádliga hoyrdi systrina rópa aftanfyri: „Tað gongur jú fínt, tú dugir sjálvur!"

Jú takk, eg dugdi sjálvur! Oman eftir einari brekku, yvir um ein veg, upp um kantsteinar og inn í urtagarðin hjá handilsmanninum. Og nei, sum eg fekk ilt og sum eg græt og so heim til mammu at finna troyst og at smetta: „Hon lovaði, at hon skuldi halda væl í og ikki sleppa mær."

Mamman uggaði hann, meðan hon forkláraði, at tað var ikki við nakrari ringari ætlan, at systirin ikki helt tað, sum hon hevði lovað.

„Men," helt mamman fram, „Jesus heldur altíð tað, sum hann lovar, tað kanst tú lesa í Bíbliuni. Royn at taka tað upp

aftur eftir mær. Hebrearabrævið 13,5." Drongurin tók tað upp aftur og mamman helt fram: „Í Hebrearabrævinum 13,5 sigur Jesus: „***Eg skal als ikki sleppa tær og á ongum sinni fara frá tær.***"

Jútlendingurin leggur afturat: „Hatta eru nøkur vælsignaði orð úr Bíbliuni, sum mamma lærdi meg. Tey hava fylgt mær alt lívið, tá ið eg komi í truplar støður á lívsleiðini, og ikki at gloyma, tá ið lívið tykist at vera meira ringt enn gott. Tá eri eg sloppin at hvíla í hesum og uppliva, at Gud svíkur meg ikki.

Eg vildi ynskt, at mong menniskju máttu fingið lut í tryggleikanum, sum hesi orðini úr Bíbliuni geva. Tí tað er júst tryggleika og umsorgan, Gud vil geva hvørjum einstøkum okkara, meðan vit liva lívið her á jørð saman við hvørorðum.

Ikki at skilja soleiðis, at Gud harvið hevur lovað, at vit aldri fara at møta mótburði, sjúku ella øðrum trupulleikum. Men hann verður við okkum og gevur okkum sín frið í tí støðu, vit júst nú standa í. Vit kunnu rokna við Gudi.

Gert tú tað, fert tú at sanna, at Gud svíkur teg ikki. Gott nýggjár í Jesu navni!".

# Vísmenninir

*Men tá ið Jesus var føddur, tá komu nakrir vísmenn úr Eysturlondum til Jerúsalem og søgdu: „Hvar er hin nýføddi jødakongurin? Tí vit hava sæð stjørnu hansara har eysturi, og vit eru komnir at tilbiðja hann."*

*Matt. 2, 1–2.*

Teir vísu menninir úr Eysturlondum vóru av sonnum vísir. Ikki bara tí at teir kendu stjørnanna ljósa heim, men serliga tí at teir óttaðust Gud og lýddu reyst hansara.

Gudsótti er byrjanin til allan sannan vísdóm. Og gudsóttandi vóru eisini hesir vísu menninir. Gud talaði til teirra. Gud talar bara til hini ærligu og leitandi við upplatnum hjarta og viðkvomum sinni. Og Gud vegleiddi teir, og teir vísu menninir tóku við vegleiðingini.

Ikki var nóg mikið at vita vegin. Vegur skal verða gingin, tí annars ber sjálvur kongavegurin ikki á mál. Við Guds glógvandi stjørnu funnu vísmenninir tað, teir leitaðu eftir.

Teir funnu frelsaran, Kong konganna og Harra harranna. So vóru teir komnir á mál, og teir offraðu gull, roykilsu og myrru, og teir tilbóðu. Teir vóru biðjandi, teir høvdu offursinni – av sonnum vóru teir vísir.

*t.* týddi.

# Jesus krevur trúgv

*„Hav tú gott treysti, dóttir mín, trúgv tín hevur frelst teg.“*
*Matt. 9,22.*

Hvussu ymisk tey menniskju vóru, sum frelsarin hitti, meðan hann gekk her niðri, so var krav hansara til tey øll hitt sama. Tað var bara eitt, Jesus altíð spurdi um, eitt, sum hann altíð kravdi – og hetta eina var trúgv.

Hann kravdi tað sama av fátækum og ríkum, sjúkum og frískum, tollarum og fiskimonnum. Ongin slapp inn í Guds ríki, sum ikki vildi trúgva. Ongin trúgv – ongin hjálp.

Men enntá veikasta trúgvin varð góðtikin. Sjálvt ikki hini fátrúnu vórðu rikin burtur, um tey vóru ærlig. Alt annað var fyri Jesusi týdningarleyst. Trúgvin var hin stóra treytin, hitt eina treytaleysa, sum bar av øllum øðrum.

Soleiðis var tað tá, og soleiðis er tað enn. Eins og frelsarin segði við teir báðar blindu: „Trúgva tit, at eg kann gera hetta? So verði tykkum eftir trúgv tykkara.“

Og soleiðis sigur Jesus við okkum í hesi løtu. Og tað, sum Gud krevur av okkum, tað skulu vit gera. Trúgv so á hin kæra Gud, og trúgv væl!

*t.* týddi.

---

Í 1969 gingu kristnir ungdómar mótmælisgongu í Kvinesdali í Noregi. Á skeltinum stóð:

*Sum verðin er ør og vitleys*
*Vápn staðin fyri mat*
*Pornografi staðin fyri kærleika*
*Mánarakettir staðin fyri proteinir*
*Brotsligar bókmentir staðin fyri brøðralag*

e.c. ums.

# Gloymið ikki

*Ta ferðina sungu Móses og Ísraelsmenn Harranum henda lovsong og søgdu: „Eg vil lovsyngja Harranum, tí at hátt er hann hevjaður; hestum og reiðmonnum stoytti hann í havið niður!“*

*2. Mós. 15,1–2.*

Vorðið sum lovsongur! Allur 15. kapitul í 2. Mósebók er ein framúr vakur lovsongur til Harran, eftir at hann hevði banað teimum veg ígjøgnum Reyðahavið. Ikki ber til at ímynda sær, hvussu bilsnir ísraelsmenn gjørdust, tá ið havið fór í tvey og stóð sum risastór háhús úr glasi. Ikki er undur í, at teir sungu og spældu øll 21 ørindini í lovsonginum!

Men nøkur fá ár seinni hvarv gleði teirra. Sangurin tagnaði. Eftir at tey í tríggjar dagar høvdu gingið í oyðimørkini og onki vatn funnið, fóru tey at knarra og søgdu: „Hvat skulu vit drekka?“ Sangurin hvarv alt ov skjótt, tá ið tey rendu seg í ein lítlan trupulleika. Tað løgna er, at tey fóru at knarra um vatn! Høvdu tey longu gloymt Guds undur við vatninum? Tey høvdu fyri stuttum sæð Gud klúgva eitt heilt hav av vatni!

Men ikki kunnu vit loyva okkum at peika eftir teimum. Okkara lovsongur tagnar eisini alt ov skjótt, um vit gloyma, hvussu Gud verjir okkum og syrgir fyri okkum. Okkum tørvur at taka ímóti teimum ráðum, sum Gud gav Ísraelsmonnum.

***Men tú skalt ansa eftir tær og vara teg fyri títt lív ikki at gloyma tað, sum tú við egnum eygum hevur sæð, og ikki lata tað fara tær úr minni allar ævidagar tínar, men kunngera tað eisini børnum og barnabørnum tínum.***

5. Mós. 4,9.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7. jan. | Tekstur: | Jóh. 20,30–31; 21,25; Sálm. 119,9+26b+27+105+130. | bíbliuorð: | Sálm.119,105 |
| 14. jan. | Tekstur: | Róm.15,4 og 2. Tim. 3,16–17 og Jóh.3,16. | bíbliuorð: | Luk. 21,33 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 2* *21. januar 2018* *78. árg.*

# Hvør dagur er ein nýggjur dagur

*Tá ið tit síggja sáttmálaørk Harrans, Guds tykkara, og levitaprestarnar bera hana, tá skulu tit fara úr staði tykkara og ganga aftan á hana; men millum tykkara og hennara skulu vera um tvey túsund alnir; ikki mega tit koma tætt at henni – til tess at tit mega vita, hvønn veg tit eiga at ganga,* ***tí at tit hava ongantíð gingið har áður.*** Jósva 3, 3–4.

Tá ið ísraelsfólk fyrireikaði ferðina inn í Kana'ansland, fingu tey boð um ikki at fara til gongu, fyrr enn tey sóu sáttmálaarkina verða borna framman fyri teimum; tá skuldu tey fara aftan á henni, tí sjálvi vistu tey ikki vegin, tí tey høvdu ikki verið har fyrr.

Í grundini er tað soleiðis við okkum øllum, og tað er galdandi alt lívið, ja satt at siga hvønn einasta dag. Vit hava ikki livað lívið fyrr, og hvør dagur er ein púra ***nýggjur*** dagur. Um vit hugsa um hetta, at vit ongar royndir hava at byggja á, so átti tað at gingið upp fyri okkum, hvussu trupult og mangan vandamikið lívið í veruleikanum er. Sjálvandi koma royndirnar hjá undanfarnum ættarliðum okkum væl við, og foreldur okkara og onnur menniskju koma okkum til hjálpar. Men kortini stendur tað fast, at vit øll eru á ferð gjøgnum lívið fyri fyrstu ferð. Lívið liva vit soleiðis sæð sum niðursetufólk. Og hóast vit læra nógv ígjøgnum tey árini, sum vit leggja aftur um bak, so er hvørt skeið á lívsleiðini nýtt og óroynt – barndómur, ungdómur, manndómur og aldurdómur.

Um vit hugsa um alt hetta, er tað so ikki alt ov vágið einsamallur at vilja stýra síni lívsleið? Ikki er at undrast á, at lívið hjá mongum verður meira ella minni miseydnað, sæð

í ævinleikans ljósi. Og tað nýtist ikki at gangast soleiðis, tí Harrin hevur lovað at leiða okkum trygt allan vegin. Eydnurík eru øll tey, sum kunnu taka undir við Asafi: „Tú hevur tikið í mína høgru hond! Tú meg leiðir við tínum ráðum og tekur meg síðan til dýrdar.“ Vælsignaða lív – so trygt og ríkt! Hvussu mong mistøk verða vit tá ikki spard fyri! Tað hendir so mangan, at vit koma okkum út í vandar, sum liggja framman fyri okkum, og vandin liggur kanska fjaldur, tí okkum manglar royndir. Tá er gott at fáa hjálp, og tess meira vit í áliti og barnsligari trúgv líta okkum í Guds leiðslu og varðveitandi náði, løtu eftir løtu, tess tryggari kunna vit vera. **„Ongum er so trygt at fara sum Guds lítla barnaskara.“** Ja, hjá honum eru vit trygg!

# Slatur

*Men hvør menniskja veri snar til at hoyra, sein til at tala, sein til vreiði; tí at vreiði mans virkar ikki rættlæti fyri Gudi.*
*(Ják. 1,19–20).*

Fyri nøkrum árum síðani sótu nøkur fólk saman og hugnaðu sær. Ein teirra, ein maður, var sera lívligur og prátaði ein hóp um ein persón, sum ikki var hjástaddur. So einaferð tekur ein veik, sjúklig kona til orða og spyr róliga tann prátingarsama mannin: „Hatta, tygum søgdu um hann, sum ikki er her: **„Er tað satt?“**

Viðkomandi bedýraði, at so var.

Síðani kom næsti spurningur frá konuni: **„Er hatta vinarligt?“**

Tað helt hann avgjørt, at tað var. Tá ið tað var satt, hevði hann rætt at siga tað, sum hann hevði sagt.

At enda segði tann annars so stilla konan: **„Er hatta neyðugt?“**

Tað gjørdist púra kvirt í stovuni. Hesir tríggir setningarnir: „Er hatta satt? Er hatta vinarligt? Er hatta neyðugt?“ er ein góð vekt at royna orð okkara á. Skriftorðini her omanfyri vóru: „Hvør menniskja veri snar til at hoyra, sein til at tala.“ Vit gera sjálvi av, hvat ið vit nýta tað til, sum vit hoyra. Tað, sum vit lurta eftir og lova inn í sinni okkara, formar og skapar okkum. Og tað, sum vit bera víðari, sigur, hvørjum vit eru upptikin av. Er tað satt? Er tað vinarligt? Er tað neyðugt?

# Liva virðiliga

Tá ið Elisabeth drotning var ung prinsessa, segði hon:„Eg eri ein prinsessa, og av tí at eg eri ein prinsessa, fari eg at gera alt, sum mær dámar at gera.“ Abbi hennara, Georg 5. segði: „Á nei, lítla frøkun, tað er júst av tí, at tú ert ein prinsessa, at tú aldri fært høvi at gera alt tað, tær dámar at gera.“

Um vit hava fingið lut í einum stórum kalli og eini týðandi uppgávu í lívinum, hava vit frælsi, men eisini ábyrgd. Ein kristin er kallaður til at vera Guds tempul, Harrans sendiharri, Jesu umboðsmaður her í heiminum. Eini framíhjá-rættindi – og ein uppgáva. Paulus skrivaði til tey kristnu í Efesus: ***„Eg áminni tykkum tí, eg hin bundni í Harranum, til at liva soleiðis, sum hóskandi er fyri ta kallan, sum tit vórðu kallaðir við.“*** (Efesus 4,1).

# Tað, sum vit lurta eftir

Tveir vinir fóru tvørtur um ein veg við nógvari ferðslu. Annar segði: „Húsj! Hoyrir tú, hvussu grashoppan spælir?“ „Nei,“ svaraði hin, „hvussu kanst tú hoyra eitt so veikt ljóð her í øllum hesum larminum?“ „Tað er, tí eg havi vant oyrað at lurta eftir hesum skordýrinum. Men fólk hava vant seg at lurta eftir einum øðrum ljóði,“ segði hann, og so blakaði hann nakrar smápengar niður á gongubreytina. Í somu løtu sóu teir at fólk enntá fleiri metrar burturfrá snaraðu sær á at vita, um tey høvdu mist nakrar pengar.

Ja, vit hava oyra fyri tí, sum hevur týdning fyri okkum. Tann Heilaga Skriftin eggjar okkum til at lurta eftir Guds orði, soleiðis sum tað stendur í Bíbliuni, í boðan og vitnisburði. Tað stendur, at Jesus segði: *„Ja, men sæl eru tey, sum hoyra Guds orð og varðveita tað.“ (Luk. 11,28).*

---

Ein ungdómur spurdi eina eldri trúgvandi konu: „Hvat kann eg sum trúgvandi taka lut í?“ Konan svaraði: „Alt tað, sum tú kanst gera í Jesu navni, ger tað. Men tað, tú ikki kanst gera í Jesu navni, lat vera við tí.“

*e.c.* ums.

# Tú hevur ikki skyldina

Ein sjúkrahúsprestur greiðir soleiðis frá: „Tá ið fólk gerast álvarsliga sjúk, missa tey tamarhaldið á lívi sínum. Tá ið sjúklingarnir spyrja, hvat ið teir hava gjørt, síðani sjúkan rakar teir, svari eg, at í kristindóminum er einki samanhang millum skuld og lagnu.

Job er óður við Gud vegna líðing sína, men avsannar uppáhaldið, at hon skuldi verið ein revsing frá Gudi. Í Matt. 5,45 stendur: „Hann letur sól sína rísa fyri illum og góðum og letur regna niður yvir rættvís og órættvís."

Trúgvin gevur ugga og frið, tí vit kunnu leggja lív okkara í Guds hond. Nógvir sjúklingar kenna seg einsamallar og burturgloymdar, tá ið teir liggja í sjúkrahússongini úti á tromini á lívinum. Men tá kann eg vissa teir um, at teir eru ikki teir fyrstu. Guds sonur kendi seg einsamallan, tá ið hann hekk á krossinum í størstu líðingini. Og kortini reis hann upp triðja dagin. Tað merkir, at hóast tað kennist, sum at alt er mist, so halda vit, sum eru kristin, fast í vónini! Tað er altíð meir at siga. Tað er altíð grund til uppreisn hóast okkara umstøður.

Ferð eftir ferð sigur Jesus við lærusveinar sínar: „Óttist ikki!" Og tað sama sigur eingilin við kvinnurnar, tá ið tær koma til Jesu tómu grøv.

Hasi orðini virka á sama hátt, sum tá ið foreldur siga tey við børn síni. Foreldur kunnu heldur ikki verja børn síni móti verðini og móti sjúkum, men tey kunnu skapa tryggleika. Mangt er tungt og pínufult, men óttast skulu vit ikki."

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tann familjan, sum biður saman, verður verandi saman.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21. jan. | Tekstur: | Matt. 3,3; Jes. 40,3; Matt. 4,10 og 5. Mós. 6,13. | bíbliuorð: | Hebr. 13,8 |
| 28. jan. | Tekstur: | Luk. 2,41–52. | bíbliuorð: | Matt. 2,49b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74